# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.08.2016*

**Bygdaráðsfundur: 29.08.2016 kl. 17.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Mortan Højgaard | x |
| | Jákup Olsen | x |
| | Súnfríð Jacobsen | x |
| | Marjun Gaardbo skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 82/2016 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.32.10-S08-09-15

**Málslýsing**

Onnur viðgerð av reguleringum á fíggjarætlanini 2016. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 27.06.2016.

Í samb. við gjøgnumgongd av rakstrinum fyri fyrstu 5 mánaðarnar 2016, samanborið við fíggjarætlanina fyri 2016 er staðfest, at tað er ov lítið avsett á nøkrum kontum, fyrisitingin mælir til fylgjandi reguleringar á fíggjarætlanini fyri 2016.

| **Rakstur** | **tkr.** |
|---|---|
| §1 Kommunal Fyrisiting | 155 |
| §2 Almanna- & Heilsumál | 629 |
| §5 Mentan & Frítíð | 20 |
| §6 Teknisk mál | 182 |
| §7 Kommunal virki | 80 |
| | **1.066** |
| **Inntøkur** | |
| §20 Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøki | **-604** |
| **Rakstur í alt** | |
| | **462** |
| **Íløgur** | |
| §6 Teknisk mál | 200 |
| **Íløgur í alt** | **200** |

| | |
|---|---|
| Broytingar rakstur | 462.000 |
| Broytingar íløgur | 200.000 |
| **Broytingar í alt** | **662.000** |

**Tilmæli**
Á fundi 23.06.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við reguleringunum til fíggjarætlanina fyri 2016, og reguleringin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 25.08.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av reguleringunum á fíggjarætlanini fyri 2016.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 83/2016 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.30-P20-2-16
**Málslýsing**
Onnur viðgerð av asfaltering millum bygningar hjá Faroe Origin. Fyrsta viðgerð var á bygdaáðsfundi 27.06.2016.

Í skrivi 06.05.2016 søkir Faroe Origin um at fáa økið millum bygningarnar asfalterað. Uppá fyrispurning hevur kommunan fingið tilboð uppá asfaltering á havnalagnum við Faroe Origin, sum er 410 m² til víddar. Tilboðið er áljóðandi kr. 137.300,00 u/mvg.

**Tilmæli**
Á fundi 23.06.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 137.000,00, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 25.08.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 137.000,00, og at peningurin verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 84/2016 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.03.30-P20-2-16 Havnalagið
J. nr. 05.01.00-P20-7-16 Gaddavegur
J. nr. 05.01.00-P20-1-16 Lýðarsvegur

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.08.2016*

**Málslýsing**
Onnur viðgerð av asfaltering 2016. Fyrsta viðgerð var á bygdaráðsfundi 27.06.2016.

Uppá fyrispurning hevur kommunan fingið tilboð uppá asfaltering, av havnalagnum við Rætt, Lýðarsvegi og gongubreyt á Gaddavegnum, frá EM Asfalt og HJ Asfalt. Vísandi til mál nr. 64 og 65 á bygdaráðsfundi 30.05.2016 og mál nr. 61 á bygdaráðsfundi 31.08.2015.

Kostnaðurin, hjá Nes kommunu, fyri at gera økini klár til asfaltering er kr. 474.000.

Samlaða tilboðið frá EM Asfalt er áljóðandi kr. 1.001.020 og samlaða tilboðið frá HJ Asfalt er áljóðandi kr. 1.107.525

**Tilmæli**
Á fundi 23.06.2016 mælir Fíggjarnevndin til at arbeiðini verða gjørd og at tikið verður av tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 1.001.020 u/mvg. Samlaða íløgan kr. 1.475.020 verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 25.08.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av arbeiðinum av asfaltering, og at tikið verður av tilboðnum frá EM Asfalt áljóðandi kr. 1.001,020. Peningurin fyri samlaðu íløguna, kr. 1.475.020, verður tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 85/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**
J nr. 02.34.02-P20-25-16
**Málslýsing**
Í skrivi 01.06.2016 søkir Samuel Joensen um at fáa til keyps grundstykki, við Kvíggjarveg, matr. nr. 699bh og stykkið suður ímóti geilini, burtur av matr. nr. 699a.

**Tilmæli**
Á fundi 15.06.2016 mælir Tekniska nevnd til at játta Samuel Joensen grundstykkið, við Kvíggjarveg, matr. nr. 699bh, og at hann fær loyvi til at ogna sær stykkið suður ímóti geilini, burtur av matr. nr. 699a.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.08.2016*

**Mál nr. 86/2016 Undirvísing**

J.nr. 17.01.10-P05-2-16

**Málslýsing**

Í skrivi 24.06.2016 vísir skúlin á, at í trý ár hava skúlin og barnagarðurin samstarva um eitt forskúlatilboð til børn í Nes kommunu. Hesi árini hevur bert verið undirvíst í føroyskum og málmenning.

Nú halda barnagarðurin og skúlin, at tíðin er komin til eisini at menna talfatanina hjá børnunum, og tí søkja tey Nes kommunu um at løna einum lærara við 1 tíma um vikuna komandi skúlaár, tvs. frá 1. august til 31. juli. Mettur kostnaður er uml. kr. 15.000,00 fyri árið.

**Tilmælir**

Á fundi 17.08.2016 mælir Mentanarnevndin til at játta pening til at gjalda einum lærara, til mennan av talfatanini, 1 tíma um vikuna, frá 1. august til 31. juli.

Á fundi 25.08.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini, og at peningurin verður tikin av stovninum barnagarðurin ”frá jólum til jóla”.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2016 Parkir frítíðar/ítróttarannlegg og lendisrøkt v.m.**

J.nr. 04.03.00-P20-2-16

**Málslýsing**

Spæliplássið til barnagarðin er ov lítið og hevur verið tosað um møguleikan at gera spælipláss og úti fitness, á stadionøkinum, sum liggur tætt at varnagarðinum. Hugsað er um økið í sunnara enda millum kastigarðin og rennibreytina.

**Tilmælir**

Á fundi 17.08.2016 mælir Mentanarnevndin til, at kanna møguleika og kostnað við at gera spælipláss og úti fitness á Svangaskarði.

Á fundi 18.08.2016 tekur Trivnaðarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

Á fundi 25.08.2016 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini og Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Mentanarnevndini, Trivnaðarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.08.2016*

**Mál nr. 88/2016 Útstykking og lendisskipan**

J.nr. 01.04.00-G01-1-16

**Málslýsing**

Í skrivi 15.06.2016 søkir Jógvan Højgaard um loyvi til at ogna sær uppískoytisstykki til matr. nr. 763, burtur av matr. nr. 357a og 363a.

**Tilmæli**

Á fundi 23.08.2016 mælir Tekniska nevnd til at viðmæla, at Jógvan Højgaard fær loyvi til at ogna sær uppískoytisstykki burtur av matr. nr. 357a og 363a. Niðan til vegin eystureftir og suðureftir har verðandi garður endar.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 89/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr.02.00.11-G01-1-16

**Málslýsing**

Í skrivi 02.08.2016 søkir Bjørn á Heygum, adv., vegna arvingarnar eftir Arna Toftegaard, um at fáa viðmæli til eitt sundurbýti av ognini matr. nr. 651, Toftavegur 51, soleiðis, at eitt sjálvstøðugt grundstykki í ovara parti kann verða frábýtt.

**Tilmæli**

Á fundi 23.08.2016 mælir Tekniska nevnd til at viðmæla sundurbýtið av ogni matr. nr. 651, Toftavegur 51.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 90/2016 Bygningsreglulering, grundstykkir og reglugerðir**

J.nr. 02.34.02-P20-17-16

**Málslýsing**

Í skrivi 29.06.2016 søkja Vónbjørt og Klávus Sólheyg um at keypa alt stykkið norðan fyri matr. nr. 383b, burtur av matr. nr. 383a, í mark norðureftir og í mark eystureftir.

**Tilmæli**

Á fundi 23.08.2016 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið burtur av 383a í mark norðureftir og í mark eystureftir, til at selja víðari til Vónbjørt og Klávus Sólheyg.

**Avgerð**

Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av bygdaráðsfundi 29.08.2016*

**Mál nr. 92/2016 Vegir og ferðsla**
J.nr.05.04.00-P20-1-16
**Málslýsing**
Tekniski leiðarin hevur biðið um tilboð, frá tveimum arbeiðstakarum, um at gera gongugøtu frá Undir Nesinum og oman í Saltnes. Tað kom bert eitt tilboð inn. Tilboðið var frá EJ Maskinur, áljóðandi kr. 68.000 u/mvg. Kostnaður hjá Nes kommunu fyri tilfar o.a. kr. 71.000 u/mvg. Samlaður kostnaður kr. 139.000 u/mvg.

**Tilmæli**
Á fundi 25.08.2016 mælir Fíggjarnevndin til at taka av tilboðnum frá EJ Maskinur áljóðandi kr. 68.000. Kostnaður fyri tilfar og arbeiðið hjá kommununi er kr. 71.000. Samlaður kostnaður er sostatt mettur til kr. 139,000,00, og at peningurin verður tikin av stovninum vegir/viðlíkahald gøtur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Kunning:**
**Hálvársroknskapur fyri 2016 (6 mðr.) hjá Nes kommunu**

| **Rakstur** | **Hálvár 2016** | **FÆ fyri 2016 v/eykajáttan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 2.014.999 | 4.311.000 | 2.296.001 | 53,3% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 7.858.045 | 15.077.500 | 7.219.455 | 47,9% |
| §3 Børn og ung | 4.869.075 | 10.728.000 | 5.858.925 | 54,6% |
| §4 Undirvísing | 1.776.610 | 3.809.500 | 2.032.890 | 53,4% |
| §5 Mentan og frítíð | 1.189.986 | 2.732.000 | 1.542.014 | 56,4% |
| §6 Teknisk mál | 1.715.158 | 3.972.000 | 2.256.842 | 56,8% |
| §7 Kommunal virki | 1.261.327 | 2.710.800 | 1.449.473 | 53,5% |
| **Rakstur í alt** | **20.685.200** | **43.340.800** | **22.655.600** | **52,3%** |
| §20 Inntøkur v.m. | -23.989.700 | -44.484.000 | -20.494.300 | 46,1% |
| **Rakstur pr. 30.06.2016** | **-3.304.500** | **-1.143.200** | **2.161.300** | **-189,1%** |

| **Íløgur** | **Hálvár 2016.** | **FÆ fyri 2016 v/eykajáttan** | **munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 320.000 | 320.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 2.315.436 | 2.656.500 | 341.064 | 12,8% |
| §4 Undirvísing | 17.102 | 0 | -17.102 | 0,0% |
| §5 Mentan og frítíð | 791.792 | 500.000 | -291.792 | -58,4% |
| §6 Teknisk mál | -166.527 | 2.592.375 | 2.758.902 | 106,4% |
| §7 Kommunal virki | 1.943 | 596.745 | 594.802 | 0,0% |
| **Íløgur í alt** | **2.959.746** | **6.665.620** | **3.705.874** | **55,6%** |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-344.754** | **5.522.420** | **5.867.174** | **106,2%** |